**Fundarfrágreiðing frá aðalfundi Føroya Sílaveiðifelags 2026**

Fundurin varð hildin 17. apríl í høllini í gamla handilsskúlanum í Marknagili

42 fólk møttu til aðalfundin.

## Formansfrágreiðingin

Formaðurin fekk orðið, og hevði sum uppskot Per Aakjær sum orðstýrara, og var hetta samtykt. Per fekk orðið og kundi upplýsa, at aðalfundurin var lýstur í Sosialinum tann 27. mars, sum var meira enn 14 dagar fyri freistina, og tí var aðalfundurin lógliga lýstur. Formaðurin fekk orðið og byrjaði við at minnast farnar limir. Síðani seinasta aðalfund, hevur felagið mist ein lim, Max í Haraldsstovu. Vit mintust Max í 1 minutt.

Síðani greiddi formaðurin frá um árið, ið farið er. Har bleiv nevnt, at felagið fann ein deyðan laks í lívfiskakarinum, og varð hesin kannaður. Tað vísti seg at hesin var smittaður við eini avart av furunkulose, sum er ein listasjúka. Tað er fyrstu ferð, at vit hava eina listasjúku í Sílastøðini í Havnardali, og tá ið ein tíð var fráliðin kravdi HFS, at vit tóku lívið av øllum lívfiskunum. Hetta var eitt stórt bakkast, tí árið í fjør mann vera eitt tað frægasta til laks í áravís. Vit tóku 74 laksar, og onkur vildi vera við, at eini 250 laksar afturat hesum gingu gjøgnum laksateljaran. Tað er faktiskt ikki so galið. Ein slík sjúka kann smitta, eisini til annan fisk á Sílastøðini, men hvørki fiskur í gamla húsi, ella í smolthøllini vísti seg at vera smittaður. Allur fiskurin bleiv tí settur út seint í 2025. Og seinastu fiskarnir blivu settir út primo 2026.

Men hetta merkir eisini, at vit ongan fisk hava í Sílastøðini sum er. Vit nýta høvið til at dagføra Sílastøðina, tí sum er hava vit einki lívfiskaloyvi. Í roynd og veru hava vit havt undantaksloyvi síðani í august 2019, og tí mugu ábøtur gerast, so at HFS kann góðtaka okkara alistøð, í mun til rakstrarkunngerðina. HFS hevur sett fleiri krøv um ábøtur, m.a. greiðari mannagongdir á støðini, krøv til vask, og herd krøv til slúsur. Eisini eru krøvini herd í mun til flaturnar í húsinum. HFS eru ikki so fegin um træflatur, og hetta mugu vit gera okkurt við. Vit hava fingið 1 mió. krónur frá landinum til at gera ábøtur á Sílastøðina og eina meira generella menningarætlan. Tað er hetta arbeiðið, sum vit nú eru farin undir. Vit hava eisini søkt um 1 mió. krónur afturat í 2026, og bíða eftir svari.

Vit hava fingið stuðul á 489.194 frá Betri Stuðul. Hesin stuðul er oyramerktur til at umvæla laksatrappurnar í Leynum. Vit hava sum er, umvælt laksatrappurnar við laksateljaran og fingið alt hatta við laksateljaranum uppá pláss. Nú vantar niðaru laksatrappurnar frá sjóvarmálanum og niðan til summarhúsið hjá Jon Hestoy. Og so laksatrappurnar niðanfyri undirsjóvartunnilin til Vágoynna og laksatrappurnar millum Leynavatn og niðara Mjáuvatn. Stuðulin er sum nevnt oyramerktur til umvæling av laksatrappunum, og er galdandi í 2 ár. Hetta merkir, at laksatrappurnar mugu umvælast á sumri 2026 og seinast á sumri 2027 mugu laksatrappurnar vera liðugt umvældar, annars fellur stuðulin burtur.

Felagið hevur gjørt nýggjan sáttmála við festararnar í Leynum. Komandi 4 árini skulu vit rinda kr. 88.000 til festarar í Leynum. Hetta er ein hækking á 8 túsund krónur í mun til seinasta sáttmála. Vit

hava eisini gjørt avtalu við festaran í Saksun um sáttmála fyri 2026. Í ár skulu vit rinda 28.000 fyri rættin at selja fiskikort í Saksun. Tilsamans rinda vit tí 116.000 krónur fyri at sleppa framat vøtnunum í 2026.

Formansfrágreiðingin var góðtikin. Síðani vóru tvær framløgur. Heini Hátún helt tað fyrru, sum næstformaður felagsins. Tað seinnu helt Gert Holdensgaard, sum er stjóri í Danmarks Center for Vildlaks. Men fyrst Heini:

## Status endurreisn - Heini

Status um endurreisnina vit eru í var lagt fram við denti á úrslitini av genetisku kanningini. Evnini vóru hesi: (framløgan er viðheft)

1. Endurreisingarætlanin status yvirskipað – vit arbeiða á fleiri mótum í senn – kanna slagið, gera útsetingarstrategi, uppstiga sílastovuna, uppstiga vatnskipaninar (Vatn inn í Sílastøðina, laksatrappurnar í Leynum o.s.fr.) og styrkja organisatiónina.
2. Fíggjarstøða og stuðul uppreisingarætlanin – endurreisnin er mett til knappar 4 mió. kr. og vit hava higartil fingið 1,57 mió. Arbeitt verður miðvíst við «fundraising» frameftir.
3. Tað góða slagið er kjarnin í ætlanini – Stóri spurningurin er  - Hvør er okkara fiskur, er tað upprunafiskurin úr Elliðaránni, er tað fiskurin frá úsetingini 2013-2016 frá Eystri Rangá, er alifiskur blandaður uppí? Úrslitið av genkanningini vísir at fiskurin er ættaður úr Íslandi (Elliðaár og Kollafjarðar stock, lítið prógv er fyri uppíblandi frá norskum alifiski (føroyska alingin byggir á norskan alilaks). Okkara fiskur er í menning, ein nýggj grein við íslendskum uppruna tekur skap. Men innavl er í fiskinum, hetta skal rættast frameftir.
4. Okkum tørvar arbeiðskraft. Tað er avgerandi at styrkja organisatiónina (skipa arbeiðið betri og fáa meira arbeiðskraft inn. FSVF er sum ein fyritøka við umfatandi rakstrar- og menningaruppgávum.
5. Avtala verður nú gjørd við Ásu Jacobsen um at taka uppgávuna sum rakstrarleiðari av Sílastovuni og at standa fyri lívfiskaarbeiðinum – at tryggja fakliga grundaða ætlan og gjøgnumføring frameftir.
6. Limalistin verður dagførdur við kontaktupplýsingum, so vit betri kunnu kunna limir okkara frameftir við telduposti.

## Framløga Gert Holdensgaard (Danmarks Center for Vildlaks) um útsetingarstrategi frameftir

Felagið hevur fingið vitjan av Gert Holdensgaard, sum er stjóri í Danmarks Center for Vildlaks.

Gert Holdensgaard segði fra søguni hja DCV – (da_vildlaksen_vendte_tilbage – vildlaks.dk) og greiddi fra møguleikum vit nú hava tá vit skulu gera útsetingarstrategi frameftir.

Gert reksaði upp úrslit úr gen-kanningini sum Blue Analytics hevur gjørt fyri okkum í Noregi. Gert vísti á at genetiska variatiónin var góð, men avmarkað. Tað var týdningarmikið at ein laksastamma var robust yvir fyri broytingum. Gert helt at tað var basis fyri at arbeiða við genetikkini, og at

neyðugt var at broyta praksis. Vit áttu at fáa meira variatión. Tað kundu vit gera við at fáa fleiri siljafiskar og framala fleiri familjur. Tað vildi víðka um genetiska fjølbroytni.

Gert helt faktiskt at vit høvdu gjørt nakað rætt, tí afturkoman í 2025 var faktiskt góð, sammett við aðrastaðni. Hann nevndi m.a. at hann hevði verið við til at seta fleiri 100 túsund smolt út í Týsklandi, men bert fáir laksar komu aftur. Í so máta er okkara útseting – til samanbering – ein succes.

Gert legði eisini stóran dent á natúrliga gýting, og at áir kundu vera sjálvberandi. Onkur á í Danmark er sjálvberandi, nevndi Gert í hesum sambandi.

## Útsetingarstrategi frameftir

Gert umrøddi útsetingarmodellið (1 yngul, 2 ½ árssmolt, og 3 smolt) og genetiska grundarlagið vit eiga at byggja á, skal tað vera okkara egna ella bland?

**Møguleikarnir í stuttum eru:**

1. Arbeiða við tí tilfari, sum vit hava
2. Fáa sil frá siljafiskum úr Elliðará, og brúka hetta til at fáa meira fjølbroytni í okkara egnu laksastammu
3. Byggja nýggja stammu upp úr Elliðaár, t.d. seta út rogn úr EÁ í Saksun og soleiðis at kunna samanbera gongdina í Leynum og Saksun

Tilmælt er at brúka sama útsetingarmodellið, vit nýta nú at byrja við (1/3 av hvørjum slag – yngul, ½ árssmolt, og smolt) og so tillaga í mun til hvat riggar best sambært komandi uppfylging (sí niðanfyri).

Mortan Carlsson spurdi, um tað var dokumentatión fyri, at fiskurin í 2013 – 2016 kom úr Kollafjarðarstock. Tað einasta, sum vit kundu siga, er, at vit hava pappír uppá hvar laksurin er komin frá, og at vit ikki kunnu halda okkum til annað enn hetta. Heini váttaði at eftirkanna skjølini.

AVTALAÐ VAR AT FSVF KALLAR LIMIR INN TIL KUNNING TÁ LIÐUGT UPPSKOT UM STRATEGI FYRILIGGUR.

**Gert legði dent á góð tøl og uppfylging. Vit skulu kanna**

4. <u>Smoltútferðing</u>, hetta sigur nakað um úrslitið av útsetingararbeiðinum (við fysiskari fellu har man telur skipað tá smoltið fer út og ella við chipmerking og sensorum,
5. <u>Natúrliga reproduktión</u> – elektrofisking í sept, har man fær upplýsingar um vøkstur og trivnað. Hetta er umráðandi vitan í mun til útsetingarmátan. Um berevnið í ánni er lítið er best at seta størri fisk út. Gert mælti til at vit elektrofiska Leynará og Saksunnará, fyri at kanna, hvat kemur undan av fiski í áunum og hvussu nógvur fiskur er. Hetta er heilt avgerandi, eisini fyri hvussu nógv kann setast út í systemini har norðuri. Ein byrjan er at

byrja á heysti 2026 fyri at kanna hvat er har úti av fiski og hvat støddin er á hesum fiski. Og so kann mann hyggja at hesum aftur í 2030 fyri at kanna, hvussu hepnaðist. Tí slíkt arbeiði krevur nógvar hendur og er krevjandi.

Heini mælti til at menn meldaðu seg til, tá ið vit skuldu elektrofiska í heyst.

## Framløga ársroknskapur

So legði Jan roknskapin fram. Hann vísti eitt yvirskot á 58.251 krónur, og stavar hetta yvirskotið m.a. frá at vit hava fleiri limir í ár, sammett við í fjør, og at vit netto fingu á leið 30 túsund krónur meira frá okkara limum. Harnæst seldu vit eisini fleiri fiskikort í 2025, sammett við 2024.

Fundurin góðtók roknskapin.

## Nevndarval

Fyri vali stóðu Heini, Óli og Sámal. Allir tríggir vórðu afturvaldir. Tummas Nielsen hevur verið grannskoðari felagsins í mong ár, men ynskti ikki afturval. Í hansara stað valdi fundurin Per Aakjær. Felagið takkar Tummasi fyri drúgva og trúgva tænastu.

## Limagjaldið

Nevndin mælti til at limagjaldið í 2026 skuldi vera eins og í 2025, tvs. óbroytt, og var hetta samtykt.

## Innkomin mál

Undir innkomin mál, var eitt uppskot um at tað skuldi kunna fiskast á Leynavatni oman til træbrúnna, sum stendur niðanfyri Leynavatn. 20 vóru fyri, og 7 ímóti. Uppskotið var tí samtykt.

Eitt uppskot var komið inn frá limi, um tær treytir, sum skuldu galda fyri fiskarar í ár. Nógv kjak stóðst av hesum. Heini helt, at ein avmarking mátti vera og at hendan mátti vera vísindaliga grundað. Jógvan Glerfoss helt, at eitt uppskot um avmarking skuldi vera eitt millum ting millum onga avmarking og stranga avmarking.

Gert Holdensgaard bleiv spurdur, hvussu var við avmarkingum í Danmark. Hann segði, at tað kundi vera alt frá at taka 50 – 200 fiskar úr ánni. Men allur annar fiskur bleiv settur úr aftur livandi. Tað er DTU Aqua sum ásetir loyvda veiði og hvussu nógv man kann taka heim, somu skipanir eru í Íslandi, Noregi o.s.fr.

Heini helt at veiðiavmarkingar (stovnsstýring), eigur at vera grundað á fakliga metingar, sum vit síggja praktiserað kring okkum. Í grundini er hetta ikki eitt evni at atkvøða um á aðalfundi. Sí dømi her: [Laksekvoter for fiskesæsonen 2026 - Fiskepleje.dk]

Sigfríður Joensen nevndi, at fiskur kemur ikki niðan, ofta fyrr enn seint í august. Mortan Carlsson helt, at tað var alt ov nógv at taka 15 laksar pr fiskara.

Andrias Joensen mælti staðiliga frá, at vit fiska honir.

Tvey uppskot vóru tí til støðutakan

Uppskot 1 frá einum limi felagsins:

1) Verandi avmarkingar knýtt at laksafiskingini á Saksunnarvatni, Leynavatni og Mjáuvøtnum verða strikaðar.
2) Í staðin skjóti eg upp hesar avmarkingar at koma í gildið:

a. Tað er í mesta lagi loyvt at taka 15 laksar um árið

b. Tað er IKKI loyvt at taka honfisk aftaná 31. august (tvs. frá 1. sept.)

c. Tað er bert loyvt at fiska á nevndu vøtnum í tíðarskeiðnum 1. mai til 30. sept. (tvs. ikki loyvt yvirhøvur at fiska í oktober sum í dag)

Uppskot 2 frá nevndini í Føroya Sílaveiðifelag:

1) Hetta er uppskotið, sum var galdandi í 2025, tvs.
a) Allur kvennlaksur skal setast út.
b) Einans er loyvt at taka 1 laks um dagin og max 10 laksar pr kort/fiskara í veiðitíðini 2026.
c) Allur veiddur laksur skal setast út aftaná 15. september.

Atkvøðugreiðsla

Vit atkvøddu fyrst fyri uppskot 1.

Fyri vóru 9.

Í móti vóru 17.

Tvs. uppskot 1 fall

Síðani bleiv atkvøtt fyri uppskot 2:

Fyri vóru 21

Í móti vóru 5

Tvs. uppskot 2 varð samtykt.

Sostatt eru somu reglur galdandi fyri fiskarar á Saksunnarvatni, Leynavatni og á Mjáuvøtnunum í 2026, sum í 2025.

Annars hevur Thomas Vilhelm tikið upp myndir av laksi, ið hevur gýtt í Dalánni og í ánni millum Leynavatn og niðara Mjáuvatn. Hesin filmur bleiv spældur á uppvørpini, meðan fundarluttakararnir fingu sær ein góðan bita og okkurt gott afturvið. Ein limur felagsins taldi 25 pør í videosekvensinum, sum var óredigeraður. Vit kunnu tí staðfesta, at natúrlig gýting hevur verið í áunum norðuri í Leynum á heysti 2025.

Formaðurin takkaði fyri góðan fundarsið.

Fundurin lokin uml. klokkan 22

Óli Petersen, skrivari